# Føroyar á heimsins


Síða 16 sosialurin Nr. 140 — 15. september 1990

Chokerede rød-hvide drenge:
DET ER LØGN

Laudrup og co. om choksejren

De færøske klipper ikke til at rokke

Mælk

SÅ SKER DER NOGET

FÆRØSK VERDENS SENS

Kom se

Danmark!

TORKIL ÅD WIENER-BASSER

IKKE ET CHOK FOR MIG

I fodbold kan alt ske, siger Richard Møller

MED DANMAR

SENSATION NOGENSINDE

TRIUMF

NÚ ERU TAÐ VIT!

Mangan hava føroyingar fylgt við í teimum altjóða ítróttarkappingum, ið hildnar hava verið aðrastaðni.
Og ikki so sjáldan munnu vit hava sæð smátjóðir og undirtippaðar til-

verur gjørt um seg í valaliði.

**Nú eru tað ikki hini**
Vit kunnu bara nevna tvey so fesk dømi sum Egyptaland, Cameroun og Costa Rica, sum undir HM í summar vaktu mikl-an ans við sínum frálíka fótbóltsspæli.
Men nú, góðu lesarar:

NÚ ERU TAÐ VIT!
Øll heimspressan og øll ítróttaráhugað spyrja nú seg sjálvan og hvønn annan: »Hvørjir eru hesir frá Faroe Islands?»
Eftir sigur landsliðsins á Eysturríki eru nýggjar hurðar latnar upp, og nú er bara at fá sum frægast burturúr nýggju møguleikum okkara.
Omanfyri hava vit prenta nøkur útklipp úr donskum bløðum. Sum kunnugt er Danmark okkara næsta mótstøðulið í EM-bólki.

**Sum ein sólarglotti**
Sum ein maður tók til: »Hetta kom sum ein sólarglotti í okkara annars so ringu og strævnu tíðum, nú øll bert seta Føroyar í samband við risastóra uttanlandsskuld og grindadráp.»
Satt er tað. Vónandi kann hesin triumfurin geva okkum ein munadyggan skáa, og vónandi kann hetta okkara nývunna frálíka umdømi aðrastaðni eisini stimbra okkum her heima, so leiðin til ein góðan sorgleysan morgindag verður stytri.
»KOYRIÐ NÚ Á FØROYAR!»
hj.

*Føroyar stóðu á alheimsins breddum, tá yvirskriftirnar eftir tann 12. september í 1990 skuldu prentast*

**Tað fór ikki ótalað fram við borðinum, at 11 glaðir amatørar, sum enn ikki áttu sín veruliga heimavøll, sparkaðu, stríddu, tacklaðu og skutu mótstøðuna niður**

## Fótbóltshugleiðing



**Jákup Mørk**
blaðmaður
jakup@sosialurin.fo

Mikudagin vann føroyska A-landsliðið í fótbólti á Litava, sum í løtuni er styrkismett 101 pláss framman fyri okkum á heimsstyrkislistanum yvir fótbóltstjóðir.

Hetta hevur givið ekkó kring allan fótbóltsheimin, men tó langt ífrá eins hart, sum tað ljóðaði fyri nú neyvt 19 árum síðani.

12. september í 1990 verður nevnliga standandi sum dagurin, tá Føroyar skutu seg inn í alheims fótbóltshjørtu. Dagurin, tá Torkil Nielsen feldi eysturríksku arrogansuna. Og dagurin, tá Føroyar komu á alheimsins ítróttarbreddar.

Tí ongan tíð áður er lítla oyggjaland okkara á hendan hátt komið í fokus. Og sum so kann róliga sigast, at tað heldur ongan tíð fer at henda aftur við somu sjokkeffekt. Líkamikið um fótbóltur ella onnur viðurskifti eru atvold til hetta.

Tí í dag vita fólk, hvat Føroyar er fyri nakað. Kanska ikki øll, men nógv. Og nógv tey flestu av hesum nógvu, vita tað av einari einstakari orsøk. Nevnliga fótbóltslandsliðnum.

### Svakligt

Tað var annars ikki tað, sum lá í kortunum, tá Torleif Sigurðsson sáli ein kaldan heystardag í 1989 boðaði Føroya fólki frá, at FSF hevði tikið avgerð um at tekna seg til komandi EM-undankappingina.

Nú mundi maðurin í minsta lagi hava fingið stórheitsvanvid. Eitt var, at Føroyar sannførandi høvdu vunnið gull á oyggjaleikum. Móti hetlendingum og grønlendingum vóru vit eisini vanliga við yvirlutan, og vit høvdu enntá vunnið á Canada annan av tveimum venjingardystunum, sum vórðu spælir í 1989, og